# - Vit fáa gleðina afturfyri

**Marit Holm Petersen í Formula.fo hevur leingi verið virkin í Altjóða Barnalegum. Nú er hon eisini vorðin gumma hjá einum skúla í Serbien. – Vit fáa ikki pengar burtur úr hesum, men vit fáa gleðina av at geva, sigur hon**

SAMSTARV
*Snorri Brend*



*Suni Vinther fyri Reyða Kross og Marit Holm Petersen fyri Fomula.fo undirskriva avtaluna, sum verður til gagns fyri 50 sigoynara-børn í Serbien*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Havn:** – Vit sótu mestsum og bíðaðu eftir tykkum í Reyða Krossi!

Við einum lítlum skálkabrosi greiðir Marit frá ynskinum hjá fyritøkuni at stuðla hesum skúlanum í serbiska býnum Smederevo.

Tá tosið um eina samstarvsavtalu kom uppá tal, var eingin ivi í leiðsluni stóru fyritøkuni: Tey bæði vildu og ynsktu at stuðla hesi ætlanini.

– Vit kunnu øll vera við til at hjálpa hesum børnunum. Ein lítil føroysk hond, kann eisini gera stóran mun í Serbia, sigur Marit Holm Petersen, sum er kona stjóran í Formula.fo.

## Vælgerandi endamál

Hjá Formula.fo starvast í dag omanfyri 50 starvsfólk. Umframt at verða virkin í arbeiðstíðini, eru tey eisini virkin eftir loknan arbeiðsdag.

Fleiri teirra eru nevniliga við í felagsskapum, sum arbeiða við og fyri vælgerandi endamálum. Her kann nevnast Amnesty International og Altjóða Barnalegur, har Marit sjálv er sera virkin í.

Í fyritøkuni hava tey við millumbilum skipað fyri tiltøkum, við tí fyri eyga at savna inn pening til ymisk vælgerandi endamál. Og nú eru tey so eisini vorðin knýtt at arbeiðinum hjá Reyða Krossi.

– Vit vilja fegin vera við til at hjálpa øðrum, men tað er ikki altíð so lætt at vita, hvussu hjálpin verður nýtt á hesum støðum.

– Nú fáa vit so møguleikan at hjálpa til við eini ætlan, har vit sjálvi stuðla og kunnu fylgja við í tí sum hendir í hesum skúlanum í Smederevo, sigur Marit.

## Vilja mála skúlan

Samstarvsavtalan millum Reyða Kross og Formula.fo er galdandi í ár og næsta ár. Eftir hesi avtaluni skal fyritøkan lata eina ávísa peninganøgd til menningina av hesum barna-skúlanum, og soleiðis skapa fortreytir fyri at hesi børnini kunnu fáa eina betri framtíð enn foreldur teirra.

Men ætlanin er ikki bert at fyritøkan sjálv skal senda pening. Ætlanin er nevniliga, at tey virknu starvsfólkini og familjur teirra skulu taka lut í hesum við ymiskum tiltøkum.

– Hetta er so ein roynd at byrja eitt slíkt samstarv. Og eg vóni, at ringarnir fara at breiða seg soleiðis, at aðrar fyritøkur í Føroyum fara at gera tað sama vit, sigur Marit.

Hon hevur longu merkt til tann stóra áhugan hjá starvsfólki og familjum teirra.

– Eg havi enntá hoyrt okkurt barn spyrja, nær tey sleppa niður til Smederevo at mála skúlan, sigur Marit. Sum gumma hjá skúlanum ætlar hon sær eisini niður at vitja skúlan. Tað fer hon helst at gera seinni í heyst.

*Sí eisini greinina á síðu 9*


**Í sambandi við at sáttmáli millum Føroya og Íslands verður undirritaður mikudagin 31. august 2005 kl. 11.00 í Føroya Fornminnissavni, Hoyvík, skipar íslendska uttanríkismálaráðið í samstarvi við Løgmansskrivstovuna fyri tveimum ráðstevnum í Norðurlandahúsinum og Útvarpshøllini.**

**Norðurlandahúsið 31. august 2005**

## Ráðstevna um vinnumál

*Fundarstjóri: Katarina Nolsøe*

**Skrá:**

14.30 Jóannes Eidesgaard, løgmaður Føroya, setur Vinnuráðstevnuna

14.40 Davíð Oddsson, uttanríkisráðharri Íslands, ber fram kvøðu

14.50 **Innihald og týdningur sáttmálans**
Herluf Sigvaldsson, stjóri í uttanríkisdeildini í Løgmans skrivstovuni

15.10 **Fríhandilsnet Íslands og EFTA**
Grétar Már Sigurðsson, stjóri í handilspolitisku deildini í Uttanríkismálaráði Íslands

*15.30 Kaffi/køkur*

15.50 **Útrás – dømið Ísland**
Jákup Jacobsen, eigari Rúmfatalagersins

16.10 **Samstarvsmøguleikar í fiskivinnuni**
Marita Rasmussen, samskipari fyri fiski- og alivinnuna, Vinnuhúsið

16.30 **Einskiljing í Íslandi**
Illugi Gunnarsson, ráðgevi uttanríkisráðharra Íslands

*16.50 Ráðstevnan endar*
*Ábit og kunning um lambskjøt í forhøllini*

**Útvarpshøllin 1, september**

## Ráðstevna um mentamál

*Fundarstjóri: Þóra Þóroddsdóttir*

**Skrá:**

14.00 **Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri Føroya, setur ráðstevnuna**

14.10 **"Á gólvi hjá gomlum vini" - stuttsøga eftir Davíð Oddsson**
Carl Johan Jensen týddi. Hans Tórgarð, sjónleikari, lesur

14.25 **Samband tjóðanna millum, mál og søga**
Jóhan Hendrik W. Poulsen, málfrøðingur

14.45 **Úlfhamssaga, søgukvæði verður leiksýning**
Leikstjóri og samstarvsfólk: María Ellingsen, Eivør Pálsdóttir og Snorri Freyr Hilmarsson

*15.05 Kaffi/køkur*

15.25 **Samband tjóðanna millum – sjálvstýrisstríð og sjálvræði**
Kári á Rógvi, løgfrøðingur

15.45 **Sámal Ravnsfjall syngur vísur**

16.00 **Samstarv millum íslendsk og føroysk leikhús**
Tinna Gunnlaugsdóttir, tjóðleikhússtjóri í Íslandi

*16.20 Ráðstevnan endar*



# Úlfhamssaga
- beint frá hjartanu

Hósdag 1.september
kl:18:00 og kl:21:00

Ævintýralegur sjónleikur um vakrasta kærleika og ljótasta gand.

Tónlist flytur :
Eivör Pálsdóttir

Atgongumerkjasøla
Norðurlandahúsið
tel: +298 317900
nlh@nlh.fo